## Sbragia úr Sunderland

Hóast tað eydnaðist Ricky Sbragia at tryggjað Sunderland framhaldandi tilveruna í Premier League, hóast liðið sunnudagin tapti seinasta dystin ímóti Chelsea, hevur hann valt at lagt frá sær. – Eg haldi, at felagið treingir til eitt størri navn. Tað sá svart út, tá eg kom til, men eg haldi meg hava loyst mína uppgávu her, segði hann við BBC.



## Nadal tók Borg-met

Spanski tennisspælarin, Rafael Nadal, sum er ovast á heimsstyrkilistanum, tók í gjár eitt gamalt met hjá svenskaranum, Björn Borg. Tá Nadal vann á brasilska Marcos Daniel, var tað hansara 29. sigur á rað í French Open, og sostatt hevur hann yvirhálað Björn Borg, sum í árunum frá 1978 til 1981 vann 28 dystir á rað í fronsku kappingini. Vinnur Nadal ein sigur aftrat, tekur hann eisini samlaða metið, sum kvinnuligi spælarin, Chris Evert, setti við 29 sigrum millum 1974 og 1981.



*Steypið »við teimum stóru oyrunum« er ítøkiliga prógvið fyri, at tú ert bestur í Europa*

# Sætta uppgerðin millum risarnar

**Bryan Robson, Diego Maradona, Mark Hughes, Eric Cantona, Rivaldo og Paul Scholes. Allir hava teir sett síni merki á klassisku uppgerðirnar millum Manchester United og Barcelona. Mikukvøldið hittast risarnir fyri sættu ferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Møk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stóri dysturin í dystinum, tá Champions League-finalan er á skránni í morgin, stendur millum Lionel Messi og Cristiano Ronaldo. Messi verður í løtuni roknaður sum stórfavorittur til heitið sum ársins spælari í 2009. Ein heiður, sum Ronaldo vann sær í fjør.

Meira enn persónligu herðaklappini er tað tó steypið við stóru oyrunum, sum stendur upp á spæl hesaferð. Fimm ferðir áður hava Barcelona og Manchester United dystast í europiskum høpi, og mest sum hvørja ferð hevur talan verið um spennandi uppgerðir, sum í dag verða roknaðar sum týðandi partar av europisku fótbóltssøguni.

### Robson basti Maradona

Fyrsta europiska uppgerðin millum Manchester United og Barcelona var í mars mánaði í 1984. Hvørki av liðunum hevði vunnið meistaraheitið í drúgt áramál, men í steypakappingini hevði kortini bragdað, og á pappírinum var talan um sannan brellbita millum tvey av best umtóktu liðunum í Europa.

Fyrra dystin á Camp Nou stríddist Manchester United við rygginum móti múrinum. Teir vardu tó framúr væl, men eitt sjálvmál frá Graeme Hogg og eitt kanónskot frá Juan Carlos Rojo bóru við sær, at Barcelona stóð við einum framúr útgangsstøði undan seinna dystinum.

Umframt dysti millum tvey stórfeløg, so var talan eisini um uppgerð millum tveir av bestu miðvallarunum í heiminum. Bryan Robson sprongdi enska transfer-metið, tá Manchester United keypti hann frá West Bromwich Albion, og altíð hart arbeiðandi miðvallargeneralurin var lykilin, um United skuldi venda uppgerðini.

Hinumegin miðlinjuna stóð tó heimsins dýrasti spælari. Diego Maradona, sum nú veruliga var við at gerast tann stórspælarin, sum tær 60 milliónirnar, ið Barcelona hevði sent til Boca Juniors, bóru boð um.

Men á Old Trafford var tað stríðsmaðurin, sum vann á bóltsnillinginum. Við einum ófatiligum arbeiðsavriki helt Captain Marvel Maradona mest sum úti úr dystinum. Sjálvur skoraði Robson eisini tey bæði málini, sum fingu javnvág í roknskapinum. Fyrru ferðina, tá hann tveitti seg og stútaði hornaspark í netið, og aðru ferðina, tá hann gjørdi sær dælt av mistaki frá Javier Urroticoechea.

Og sjálvandi var tað eisini Robson, sum byrjaði álopið, sum avleiddi avgerandi málið, ið Frank Stapleton sendi í kassan til samlaðan 3-2 sigur.

Dysturin livdi tó fram til tað seinasta, og í evstu løtu sendi Bernd Schuster eitt skot bara sentimetrar út um stólpan. Men tá alt var av,